

Annika Olsen
*Landsstýriskvinna í innlendismálum*

# Ferðslutrygdararbeiðið hevur gjørt mun

Í 2007 varð álitið um "Ávegis til nullhugsjónina" latið politiska myndugleikanum. Úrslitið av hesum áliti var ferðslutrygdarætlanin frá 2007, sum hevði heili 35 tilmæli til politiska myndugleikan um ábøtur á ferðslutrygdina í Føroyum. Arbeiðið við at seta hesi tilmæli í verk hevur gingið væl, og í dag, 3 ár eftir at ferðslutrygdarætlanin varð latin poltiska myndugleikanum, eru 20 tilmæli longu sett í verk. Meginparturin av hesum tilmælunum vórðu sett í gildi í fjør, tá ið Løgtingið samtykti rúgvismiklar broytingar í ferðslulógini. Her var m.a. krav sett til, at øll skulu sita í trygdarbelti, nullmark varð sett fyri rúsevni í ferðsluni, sera lágu bøturnar vórðu hækkaðar munandi, promillumarkið varð sett niður fyri at signalera, at rúsdrekka og bilur ikki hóska saman og ikki minst kravið um, at børn skulu vera íbundin í bilinum. Umframt dagførdu ferðslulógina eru eisini onnur tilmæli fylgd, m.a. arbeiðið við at ferðslutryggja vegamót. Her kunnu nevnast vegamótið inn á Kambsdal, vegamótið í Streymnesi og Hósvík.

Meðan omanfyristandandi tilmæli longu eru sett í verk, eru onnur tilmæli ávegis:

Sjálvvirkandi ferðkanningar, venjingarbreyt og kommunalar ferðslutrygdarætlanir.

Tað sum sjálvsagt er at fegnast um er, at ferðslutrygdararbeiðið og fylgdu tilmælini vísa seg at hava gjørt mun. Sambært hagtølum frá Landsverk vísir tað seg, at talið á óhappum við fólkaskaða er minkað við 30% í mun til 2006. Sjálvsagt eru tað mong viðurskifti, sum spæla inn, tá ið tílík hagtøl verða gjørd upp, m.a. fíggarlig sveiggj í búskapinum, og tískil eiga tílík hagtøl at vera sæð yvir eitt longri tíðarskeið. Tó er tað nakað, sum bendir á, at vit eru á rættari kós, tí seinast í 80` unum vóru skrásett umleið 2000 ferðsluóhapp um árið, meðan talið av óhappum í 2009 lá um 900.

## Nýggj tilmæli

Samstundis sum arbeitt verður víðari eftir ferðslutrygdarætlanini er tað neyðugt at dagføra og umhugsa onnur skilagóð tilmæli, sum kunnu betra um ferðslutrygdina. Ì Løgtinginum herfyri setti Jenis av Rana, formaður miðfloksins, mær spurningin, um fyrstihjálparskeið eigur at vera eitt krav til fólk, sum taka koyrikort. Eg meti hetta tilmæli vera sera skilagott, og fari eg at heita á ferðslutrygdarbólkin um at viðgera hendan spurningin. Tað er oftani tann fyrsta hjálpin, ið er tann avgerandi fyri um lív kunnu bjargast, og tí eigur hetta eftir mínum tykki at vera eitt lógarkrav, at bilførarar hava fyrstihjálparskeið. Somuleiðis meti eg tað vera rætt, at arbeitt verður víðari við einari venjingarbreyt ella koyritekniskum anleggi, har fólk undir tryggum umstøðum kunnu læra at handfara eitt akfar í eitt nú hálku. Somuleiðis er ætlanin, at venjingarbreytin kann vera karmur um ein ferðslutrygdardepil, har eitt nú Ráðið fyri ferðslutrygd kann hava frálæru um ferðslutrygd. Hugburðurin og upplýsingin um ferðslu hevur alstóran týdning fyri trygdina á føroysku vegunum.

Mist lív í ferðsluni kosta føroyska samfelagnum milliónа upphæddir, og ikki minst mongum familjum kring landið árliga mikla sorg. Vit hava ikki ráð til at missa fleiri fólk í ferðsluni, og tí má politiska stavnhaldið vera, at ongin skal lata lív í ferðsluni.

---



Bjørn Kalsø
*løgtingsmaður*

# Sjúklingurin við Svartaperi

*At Landssjúkrahúsið (LS) ikki megnar at halda játtan og eina javna viðgerðargongd alt árið samstundis, hevur verið afturvendandi. Tað hevur havt sera óhepnar avleiðingar við sær fyri sjúklingar, avvarandi og starvsfólk. Støðan er órviðilig og má halda uppat*

## Støðan á LS óvirðilig

Í skrivani stund eru vit vitni til somu syrgiligu afturvendandi søgu. Doyggjandi sjúklingar og avvarandi hava ikki umstøður, sum sømir seg slíkum. Illa sjúk fólk liggja á gongini. Skurðviðgerðir verða ikki framdar og kennast bíðitíðirnar ótolandi. Og starvsfólkini eru ovbyrjað orsaka av óregluligu viðurskiftinum, sum tíverri alt ov ofta valda, tá líður á árið og greitt er, at játtanir ikki fara at halda.

Hóast stjórar og landsstýrisfólk eru sagd úr starvi á LS seinnu árini, sita sjúklingar, tey avvarandi, og starvsfólkini framvegis við Svartaperi.

Støðan er óbroytt, óvirðilig og má halda uppat beinanveg!

## Akkutta støðan má loysast alt fyri eitt

Um tað var rætt at loysa stjóran á LS úr starvi, fari eg ikki inn á í hesum sambandi. Kortini kann sláast fast, at tað at sekkja ein stjóra í sjálvum sær ikki loysir akuttu ótolandi støðuna hjá sjúklingum, avvarandi og starvsfólki.

Landsstýrismaðurin, Aksel V. Johannesen, má tí fara til verka alt fyri eitt, og finna eina virðiliga loysn, fyri tey, sum eru ringast fyri.

## Framtíðar sjúkrahúsverkið í Føroyum

Eitt er akutta støðan, annað er at gera enda á afturvendandi trupuleikanum innan føroyska sjúkrahúsverkið.

- Hvussu tryggja vit okkara sjúku viðgerð á minst sama støði, sum okkara grannar, alt árið?
- Hvørjar skipanir skulu setast í verk, sum tryggja, at nýtsla av nýggjum neyðugum framkomnum heilivági ikki kollsiglir restina av sjúkrahúsverkinum?
- Er fíggjarstýringin nóg neyv, hava vit rætta leiðslubygnaðin, keypa vit har tað er bíligast, hava vit gjørt okkum greitt, hvørjar tænastur vit ynskja, at sjúkrahúsverkið skal veita og hvussu nógv eru vit sinnað at gjalda fyri tænasturnar?

Allir hesir og ivaleyst aðrir við, eru spurningar, sum politiska skipanin má taka støðu til. Tí tað er avgerandi neyðugt at fáa í lag eitt sjúkrahúsverk, hvørs fremsta mál er at seta sjúkling og avvarandi í miðdepilin alt árið.

Ikki fyrr enn tá kunnu leiðsla og starvsfólk innan sjúkrahúsverkið sigast at hava fingið nøktandi karmar at virka undir.

---



Kristin Poulsen

# Dialektir í Kringvarpinum

Sjálvandi skal pláss vera fyri dialektum í Kringvarpinum, men máti skal vera við. Tað eigur ikki at koma fyri, at vit í tíðindasendingum hoyra máliskur sum teir hevði« og »útoyggjarnir«, og vit eiga eisini at kunna krevja rættar endingar í eini almennari tíðindasending.

Tvey dømi um dialektir, sum vit seinasta árið hava hoyrt í útvarpinum, tæna ongum endamáli, og eg vil halda uppá, at eingin vágbingur og einki eiðisfólk tosa soleiðis í dag. Hesir upplesarar gera sínum bygdamálum eina bjarnatænastu við sínum ekstremu úttalum og fáa fólk at venda sær ímóti teimum.